## Skjáltar við Sumatra

Ein harður eftirskjálvti skakaði klokkan hálvgum trý í nátt indonesisku oynna Sumatra. Skjálvtin var 6,8 á Richter-stiganum. Skjálvtin í nátt var ein eftirskjálvti frá tí harða jarðskjálvtanum, sum var við Sumatra í gjár. Tann skjálvtin gjørdi serliga stóran skaða í býnum Padang. Higartil eru umleið 467 fólk funnin deyð har, men myndugleikarnir bera ótta fyri, at uppaftur fleiri liggja deyð undir rapaðum bygningum. Millum annað rapaði eitt sjúkrahús. Meiri enn 100.000 fólk hava mist jús og heim. Jarðskjálvtin við Sumatra í gjár var 7,6 á Richter-stiganum.



# Ingeborg til reiðar at draga ALS í rættin

**Ingeborg Vinther, sum sjálv er limur í stýrinum fyri ALS, er so ørg um framferðina hjá stovninum, at hon er til reiðar at stevna**



*Ingeborg Vinther, sum umboðar løntakararnar á privata arbeiðsmarknaðinum í Stýrinum fyri ALS, kann ikki undir nøkrum umstøðum góðtaka framferðina hjá ALS og hon er til reiðar at fara allan vegin fyri at fáa tað broytt*

ALS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Verður tað neyðugt, eru vit til reiðar at stevna ALS.

Ingeborg Vinther er púra greið, tá ið vit spyrja hana siga sína meining um mannagongdina, sum ALS hevur brúkt ímóti teimum arbeiðsleysu hesa seinastu tíðina.

Ingeborg Vinther er forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, men hon er meiri enn tað, tí hon er eisini limur í stýrinum fyri ALS, har hon umboðar løntakararnar á privata arbeiðsmarknaðinum.

Tað, sum fær ein lim í stýrinum fyri ALS at taka so drastiskt til orðanna ímóti sínum egna stovni, er, at ALS tulkar ikki lógina, soleiðis sum Ingeborg Vinther heldur, at lógin skal tulkast.

Tað var nógv reyp og stórur fagnaður, tá ið tað fyrr í ár varð kunngjørt, at løgtingið hevði broytt lógina um ALS, so at útgjaldið nú hækkaði munandi.

Fyri tað fyrsta hækkaði útgjaldið upp í 80% av lønini, tó kundi tað í mesta lagið verða 20.000 krónur um mánaðin, men tað var eitt munandi framstig.

Men nú, ALS skal betala, hevur stovnurin tulkað lógina soleiðis, at fleiri kortini ikki fáa ikki meiri enn 75% av lønini.

Tað stutta av tí langa er, at ALS tulkar lógina so, at arbeiðsloysið frá síðst í nítiárunum skal telja upp í og so minkar útgjaldið í fleiri førum.

Tað hevur ikki eydnast at fáa at vita, hvussu nógvar løntakarar hetta rakar, men onkur hevur nevnt at talan er um einar 400-500, sum sostatt fáa ov lítið útgoldið, sambært Ingeborg Vinther.

### Fara allan vegin

Hon sigur, at hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast.

Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið fráboðanir frá arbeiðsleysum, sum hava fingið minni útgjald, enn tey høvdu væntað.

- Tá ið ALS lógin varð broytt, var tað ongantíð meiningin, at gamalt arbeiðsloysi skuldi vera við til at draga útgjaldið niður, staðfestir Ingeborg Vinther.

-Tað var alla tíðina tann greiða fatanin hjá stýrinum, at útgjaldið upp á 80% skuldi koma í gildið, tá ið lógin var broytt.

Tí kann hon undir ongum umstøðum góðtaka, at tað verður tulkað so, at gamalt arbeiðsloysi skal teljast upp í útrokningargrundarlagið.

Stjórin á AlS er burturstaddur, men stýrisformaðurin, Alfred Petersen sigur, at beinanvegin tey vóru gjørd varug við málið, varð biðið um eina løgfrøðiliga meting av, hvussu nýggju broytingarnar skulu tulkast.

Tá ið tað er liðugt, fer stýrið at viðgera spurningin og hann metir, at tað verður í allarnæstu framtíð, at komið verður til eina niðurstøðu.

IngeborgVinther staðfestir, at verður mannagongdin ikki broytt, fara tey at leggja málið fyri kærunevndina fyri ALS.

Men hjálpir tað heldur ikki, verður málið lagt fyri Føroya Rætt at taka støðu til.

# Løgtingslimir ætla at fella russisku bjørnina

**Í gjár fór eitt lið av løgtingslimum til Moskva at kappast ímóti tinglimum úr Russlandi og fleiri øðrum londum í Evropa**

EM FYRI TINGLIMIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið flogfarið fór úr Vágum í gjárkvøldið á veg til Danmarkar, var eitt føroyskt landslið við av tí meiri alternativa slagnum.

Talan er um eitt lið av føroyskum løgtingslimum sum eru á veg líka til Moskva, har teir skulu verja føroyska flaggið.

Tað er Duman, sum er tingið í Russlandi, ið hevur bjóðað Føroya Løgtingi og fleiri øðrum tingum í Evropa, av at kappast í ítrótti.

Fleiri ítróttarkappingar eru á skránni, men Føroya Løgting hevur meldað til í innandura fótbólti.

Við á føroyska liðnum eru John Johannessen, Eyðgunn Samuelsen, Hans Pauli Strøm, Helgi Abrahamsen, Kári P. Højgaard og Karsten Hansen og tað verður Hans Pauli Strøm, sum verður liðskipari.

Og tað verður stílur yvir tí og í sambandi við ferðina, hevur føroyska løgtingsliðið fingið draktir frá føroyska landsliðnum í fótbólti og tað forpliktar.

### Knýa vinabond

Duman í Russlandi hevur boðið tingum úr fleiri londum í Evropa til Moskva at kappast í ymsum ítrótti og blíðskapurin er so stórur, at rusarar betala alla ferðina, sum hon er.

- Hevði hetta verið eitt tiltak, sum hevði kostað landskassanum pening, vóru vit ikki farnir avstað, sigur John Johannessen, sum er næstformaður í Løgtinginum.

Hetta er fyrstu ferð, at skipað verður fyri einum tiltaki sum hesum og russarar siga, at teir hava tikið hetta stigið fyri at knýta vinabond ímillum politikarar úr londunum í Evropa.

Og tað er ikki bara ítróttur á skránni, tí á ferðini verður eisini skipað fyri útferðum til søvn, leikhús, minnisvarðar og ymisk vitjunarverd støð í Moskva.

Høvi býðst eisini at hitta borgarstjóran í Mosvka og aðrar politikarar.

Og John Johannessen sigur, at nú hann er formaður í uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum, fær hann eisini høvi til at hitta starvsbrøður sín, altso tann russiska politikaran, ið er formaður í teirri nevndini í Dumuni, sum svarar til okkara uttanlandsnevnd.

Hetta, alternativa, føroyska landsliðið verður aftur í klettunum fyrst í næstu viku.